Løgmaður:

# Kaj Leo fremur karaktermorð á meg

**Ákærunar frá Sambandsflokkinum um avtalubrot fær nú løgmann til at bíta frá sær. – Tað er ótrúligt, at leiðslan í Sambandsflokkinum velur at fremja karaktermorð á meg, ístaðin fyri at viðganga, at flokkurin hevur gjørt eitt vónleyst val av einum landsstýrismanni, sigur Jóannes Eidesgaard**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur seg vera skelkaðan av ákærunum frá leiðsluni í Sambandsflokkinum, sum vil hava hann at bróta stýrisskipanarlógina. Kortini ætlar hann ikki, at hetta skal fáa fylgjur fyri samgonguna*
*Savnsmynd*

Rumblið, um valið av avloysara fyri Bárð Nielsen sum landsstýrismann, heldur fram. Tá formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, í gjár tók seg aftur sum landsstýrisevni, endurtók hann ákærurnar móti løgmanni um avtalubrot, tí hann ikki vildi forða fyri, at Heðin Mortensen kom á ting fyri Kaj Leo Johannesen, sum skuldi í landsstýrið.

- Eg haldi tað vera toppmált naivt av leiðsluni í Sambandsflokkinum at halda, at eg kann forða fyri, at Heðin Mortensen kemur á ting, tí gjørdi eg tað, hevði eg framt brot á stýrisskipanarlógina, og so var eg ikki løgmaður longur. Hetta áttu bæði Kaj Leo Johannesen og Lisbeth L. Petersen at vita. Eftir øllum at døma duga hvørki fyrrverandi ella núverandi formaðurin í Sambandsflokkinum tær politisku spælireglurnar. Ístaðin velja tey at fremja karaktermorð á meg sum løgmann, við at geva mær skuldina fyri teirra mistøk, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sambært løgmanni fyriliggur ongin avtala um leiklutin hjá Heðini Mortensen, ið er triði maður á listanum hjá Sambandsflokkinum og harvið eykamaður hjá bæði Kaj Leo Johannesen og Lisbeth L. Petersen.

Eftir kommunuvalið í november 2004 varð Heðin Mortensen tveittur úr Sambandsflokkinum, tí hann valdi at skipa býráðssamgongu við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin.

- Eg kann vátta, at vit høvdu fund, har vit prátaðu við Heðin Mortensen fyri at royna at umganga, at støðan í býráðnum ikki fekk ávirkan á samgonguna, sum tá var nýggj. Og Heðin Mortensen hevur eisini hildið orð og givið samgonguni frið, men sjálvandi hevur hann fullan rætt til at krevja tingsessin í eini slíkari støðu sum hesari. Tað fái eg onki gjørt við, og hetta átti Sambandsflokkurin at vita. Í stýriskipanarlógini stendur heilt greitt, at tingsessurin er persónligur, og at tað er tann valdi og aleina hann, ið avger, um sessurin skal verða hansara ella ikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Skelkaður

*Fær hetta fylgjur fyri samgonguna?*

- Tað vóni eg ikki, tí eg haldi, vit higartil hava havt eitt gott samstarv, sjálvt um tað onkuntíð hevur verið ósemja millum ávísar samgongutingmenn, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Men kanst tú liva við slíkum ákærum móti tær sum løgmanni?*

- Eg haldi, tað er meiri ein spurningur, um Sambandsflokkurin kann liva við einum samgonguleiðara, sum teir ákæra fyri avtalubrot. Sjálvur velji eg at trúgva, at tað er politisk óvitinheit, at bæði Kaj Leo og Lisbeth halda meg kunna geran nakað við ein innanhýsis trupulleika í Sambandsflokkinum. Við at velja eitt umboð í Suðurstreymi, er flokkurin sjálvur komin sær í hesa støðuna. Tað áttu tey at vita frammanundan. Er eri skelkaður av, at tey geva mær skuldina fyri teirra egnu mistøk og enntá krevja av mær, at eg skal bróta lógina, sigur Jóannes Eidesgaard.

Spurdur um, hvat hann heldur um nýggja landsstýrismannin, sum altso ikki gjørdist Kaj Leo Johannesen, men Magni Laksafoss, sigur løgmaður, at hann ikki kennir Magna nakað serligt. Men, sigur hann:

- Tað er ongin ivi um, at fakligu førleikarnir eru í lagi, og hetta er altíð ein fyrimunur, tá ein skal taka við so krevjandi posti. Nakað annað er so, at hann skal læra tað politiska handverkið, men tað skal nokk koma. Har er hann sjálvandi altíð væl komin at leita sær ráð hjá okkum øðrum, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Magni heldur fast við atfinningar

**Avloysarin hjá Bárði Nielsen í Fíggjarmálaráðnum, Magni Laksafoss, hevur funnist harðliga at skattapolitikkinum hjá samgonguni. Tað ger hann framvegis.**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Spurdur um, hvussu hann fer at seta dám á fíggjar- og skattapolitikkin hjá samgonguni, sigur avloysararin hjá Bárði Nielsen, at tað er avmarkað, hvat hann kann gera upp á sjey-átta mánaðir.

- Skattapolitikkin er torført at gera nakað við, tí hesin er rættiliga tætt tengdur at samgonguavtaluni, sum eg sjálvandi verði noyddur at yvirhalda. Hinvegin havi eg góðar møguleikar at ávirka fíggjarlógina fyri 2008, og tað ætli eg mær at gera, sigur Magni Laksafoss.

### Hvussu?

- Tað fái eg ikki sagt, fyrr enn eg havi sett meg nágreiniliga inn í, hvussu støðan er júst í løtuni. Til dømis við nýtsluni, og um nýtslan skal tálmast. Vit vita heldur ikki, um húsaprísirnir hava toppað, ella teir framvegis eru á veg uppeftir. Tað er týdningarmikið at vita, hvussu konjukturstøðan er og gera inntriv út frá hesum. Hinvegin, so eru vit í einum valári, og tá er rættiliga avmarkað, hvat ber til at gera, sigur Magni Laksafoss, sum er útbúgvin búskaparfrøðingur (cand. polit.) í 1998 á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn.

Hann er í løtuni í ferð við at skriva ein phd-ritgerð um, hvussu vøkstur kann skapast í føroyska búskapinum. Nakað, sum má sigast at vera rættiliga relevant fyri starvið sum fíggjarmálaráðharri.

Ritgerðin, sum hann ger ígjøgnum Roskilde Universitetscenter, skuldi vera liðug í ár, men orsakað av nýggja og krevjandi starvinum, verður avhendingin væntandi útsett.

### Stillar upp til løgtingsvalið

Magni Laksafoss er 37 ára gamal, ættaður úr Klaksvík, men búsitandi í Streymnes saman konuni Bodil og døtrunum Noomi og Tórunn, ið eru ávikavist 14 og átta ára gamlar. Nýggi landsstýrismaðurin var uppstillaður fyri Sambandsflokkin í Norðoyggjum við løgtingsvalið í 2002, har hann gjørdist nummar trý á Sambandlistanum við 80 akvøðum. Frammanfyri hann vóru Bjørn Kalsø við 192 atkvøðum og John Kári Jakobsen við 116 atkvøðum.

Tá Magni Laksafoss stillar upp aftur til valið í januar, verður tað ikki í Norðoyggjum, men antin í Norðurella Suðurstreymoy.

Klokkan 11.15 fyrrapartin í dag útnevndi Jóannes Eidesgaard, løgmaðuri, Magna Laksafoss til landsstýrismann í fíggjarmálum. Hann tók við beinanvegin og var á sínum fyrsta landsstýrisfundi longu í morgun.

# Fyrsti fundur hjá fíggjarmálaráðharranum

**- Eg eri fegin um henda møguleikan at fara út í Fíggjarmálaráðið at royna teori'irnar av í praksis.**
**- Hetta er ein spennandi avbjóðing, sigur Magni Laksáfoss.**

RÁÐHARRI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Skotbráðið hjá mær er stutt, sigur Magni Laksáfoss, sum her verður tráspurdur av tíðindafólki*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrrapartin í dag fór Magni Laksáfoss úr Sambandsflokkinum í arbeiðshandskarnar sum nýggjur fíggjarmálaráðharri.

Á skránni var fyrst ein landsstýrisfundur, síðani móttøka í Tinganesi fyri fjølmiðlafólki og seinni fyri starvsfólkum sínum í Fíggjarmálaráðnum.

Fyrsta uppgávan hjá Magna verður at hyggja eftir, hvussu búskapurin veruliga er fyri í løtuni og hvørji útlit eru fyri tað komandi árið.

- Tað er í veruleikanum hetta, sum avger, hvussu karmurin verður fyri eina komandi fíggjarlóg.

- Hetta verður eisini størsta uppgáva mín sum fíggjarmálaráðharri, sigur Magni Laksáfoss.

### Fakliga væl fyri

Á samkomuni í Tinganesi nýtti løgmaður høvið at bera fram øll góðynski til nýggja fíggjarmálaráðharran.

- Vit hava havt ein góðan fíggjarmálaráðharra, og tí setur tað krøv til tann, sum skal loysa Bárður av.

- Men í Magna hava vit fingið ein góðan mann, sum fakliga er væl fyri til hetta krevjandi starvið. Við honum verður henda uppgávan røkt til fulnar, sigur Jóannes Eidesgaard um nýggja starvsfelaga sín.

Skotbráðið hjá Magna at seta síni fingramerki á landsins fíggjarpolitikk er stutt, tí val verður til løgtingið í seinasta lagi í januar komandi ár.

- Hóast tíðarskeiðið ikki er langt, so gleði eg meg til uppgávuna, sigur Magni.